# Eldur í bili í Klaksvík

Í Klaksvík kom leygardagin eldur í ein bil. Klokkan 12.53 varð boðað frá eldi í einum bili, sum stóð uttanfyri Leikalund. Eldurin var tó skjótt sløktur, og klokkan 13.01 kom fráboðanin um at eldurin var sløktur. Eldurin var kyknaður í vinstru síðu, og eitt luftfiltur og nakrir leidningar vóru smeltaðir.



# Máttu nýta piparspray

Ein ungur maður helt sunnunáttina, at hann skuldi gera fortreð og øsa fólk upp. Hetta varð fráboðað løgregluni, sum kom á staðið beinanvegin. Maðurin var ávirkaður av rúsdrekka, og gjørdi somikið um seg, at løgreglan vildi hava hann við á støðina. Men tá løgreglan skuldi handtaka mannin, setti hann seg ímóti handtøkuni, og stríddist ímóti løgreglumonnunum. Leysur slapp hann tó ikki, og endaði tað við at løgreglan mátti nýta piparspray, til tess at fáa tamarhald á uppøsta manninum. Hann slapp so í ein kliva á løgreglustøðini at sita, har hann kundi sissa seg aftur.




*Ovasta hæddin á húsunum yvirtendraði, og til tíðir stóð eldurin fleiri metrar upp úr longu smeltaðu tekjuni. Arne Berg Andersen tók hesa myndina klokkan 07.36*

# Kyknaði á ovastu hædd

**Leygarmorgunin festi ógvusligur eldur í eini hús tætt við Skipasmiðjuna í Havn. Fimm polakkar og ein føroysk kvinna vóru í húsinum, men sluppu út. Húsini brendu út**

112
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Eldur er góður tænari, men ringur harri. Tað máttu fimm polakkar og ein føroysk kvinna ásanna, tá tað leygarmorgunin 23. mai festi í húsini, har tey búðu.

Klokkan 07.17 leygarmorgunin kom fráboðan til alarmsentralin, um at fólk sóu royk úr einum húsum við Skipasmiðjuna í Havn. Sløkkiliðið varð sent á staðið, men hóast skjótt varð borið at, festi eldurin veruliga í og breiddi seg skjótt.

- Tá eg kom á staðið, var yvirtendrað á allari ovastu hæddini, og eldurin stóð út gjøgnum tekjuna, greiðir Anfinn Reinert, innsatsleiðari, frá.

Tá sløkkilið og løgregla kom á staðið, vóru fólkini inni í húsunum komin út úr húsunum av sær sjálvum, at síggja til uttan skaða.

- Men vit sendu sjálvandi fólk inn at vita eftir, tí tú kann ongantíð verða heilt vísur, greiðir Anfinn Reinert frá.

Eins og myndin vísir, var talan um veruliga stóran eld, og tromin stóð eldurin til tíðir fleiri metrar upp úr tekjuni, sum varð smeltað.

Umleið klokkan 8.30 hevði sløkkiliðið fingið tamarhald á eldinum, soleiðis at hann ikki breiddi seg meira. Klokkan var um 11, tá liðugt var at eftirsløkkja.

Eldurin kyknaði á ovastu hæddini, og eisini miðhæddin brendi sera illa. Niðasta hæddin er eisini farin sera illa av vatnskaða, og húsini standa neyvan at bjarga.

### Arbeiðið bjargaði teimum

Polakkarnir, sum búðu í húsunum, arbeiða á Skipasmiðjuni í Havn, og er tað MEST, sum tað nú eitur, sum syrgir fyri at teir hava tak yvir høvdið.

Eyðfinn Egholm, stjóri á MEST, greiðir frá, at polakkarnir beinanvegin hava fingið aðrar íbúðir í húsum hjá MEST at búgva í, og eru teir tískil ikki húsvillir.

- Men sjálvandi eru teir eitt sindur skelkaðir av hendingini. Lukkutíð skuldu teir til arbeiðis henda morgunin, og komu teir tí út í góðari tíð. At síggja til høvdu teir ongan sjónligan skaða, og teir vóru allir koyrdir á landssjúkrahúsið at kannast fyri roykeitran, men ongum bilti nakað, greiðir Eyðfinn Egholm frá.

Ein serdeild hjá Løgregluni, ið teldur tveir mann við serkøni, kannar nú orsøkina til eldin, og væntast eitt úrslit at fyriliggja seinni í vikuni.

# Kvinna árend við SMS

Ein eldri kvinna var um klokkan 11 í morgun árend av einum bili við fótgangarateigin niðanfyri SMS á Rasmus Effersøes gøtu. Talan var ikki um nakað álvarsligt ferðsluóhapp metti løgreglan á staðnum, men kvinnan var árend av einum bili og dottin.

Ein sjúkrabilur flutti eldru kvinnuna á Landssjúkrahúsið til nærri kanningar.

-*RN*



*Ein eldri kvinna varð í morgun um klokkan 11 árend av einum bili, tá hon var á veg um henda fótgangarateigin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Rendi á bergholsveggin

**Ein bilur við fýra ungum monnum rendi í morgun á bergholsveggin í Norðskálatunlinum, og tvey harðskapsmál vóru**

112
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Løgreglan hevur aftur havt úr at gera um hetta vikuskiftið.

Umfram stóra eldsbrunan í Havnini og grindina í Hvalvík, hava fleiri aðrar uppgávur av ymiskum slag verið at loyst.

Tvinni harðskapsmál eru fráboðað um vikuskiftið, annar kom inn og boðaði frá, at hann hevði verið fyri harðskapi seinasta vikuskifti, og hevði brotið okkurt í rygginum. Sjálvur minnist hann ikki, hvat er farið fram.

Hitt harðskapsmálið er úr Suðuroy. Ein ungur maður varð sunnunáttina koppaður uppum eitt stakitt, og hevur fingið nakrar pentur. Ein ungur maður er skuldsettur í tí málinum fyri harðskapin.

Annars greiðir vakthavandi á Løgreglustøðini í Havn frá at fleiri herverk eru fráboðað.

### Rendi á bergholsveggin

Í morgun var eitt ferðsluóhapp í Norðskálatunlinum. Miðskeiðis inni í tunlinum rennur ein bilur av eini ella aðrari orsøk inn í tunnilsveggin.

Eingin av teimum fýra dreingjunum í bilinum fingu skaða, men bilurin fór illa og kundi ikki koyra av staðnum.

Løgreglan kannaði føraran, men hann var edrúur og hevði koyrikortið í lagi. Orsøkin til ferðsluóhappið verður kallað óansni.